# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvar er Løgmaður?

Málið um søluna av Føroya Banka hevur elvt til øsing og atfinningar ymsa staðni frá. Bæði í andstøðuni og samgonguni eru komnar ákoyringar um søluleistin. Hetta kann tykjst eitt sindur óskiljandi, tí tað má vera sjáldan, at nakað mál er avgreitt í størri semju í Tinginum, enn júst hetta málið.

Í bakspeglinum kann kanska vera spurt, hví almenningurin ikki fekk ein størri part, men leisturin var nú einaferð tað, sum tingið hevði samtykt. Hetta merkir, at samgongulimir og andstøðan, Miðflokkurin undantikin, standa spillnakin í hesum máli. Tingið fekk tað, sum var umbiðið. Størsti andstøðuflokkur royndi enntá í viðgerðini at gera størri ognaravmarking enn tann, sum nú er galdandi. At tinglimir so ikki hava sett seg ordiliga inn í, hvat teir samtykkja er harmiligt, men tað er kanska ein lærupeningi til eina aðru ferð.

Tó hevur andstøðan grein í sínum máli í hvussu er viðvíkjandi einum. Hvar er Løgmaður? Sjálvandi er tað so, at ein landsstýrismaður varar av økinum, sum talan er um, men hann er partur av einari samgongu við einum samgonguleiðara. Tá so eitt mál, sum samgongan hevur framt í fullari semju við stuðuli frá nærum allari andstøðuni, elvir til ábreiðslur vendar móti landsstýrismanni og samgonguleiðslu, so eigur Løgmaður at traðka fram sum samgonguleiðari og melda út, heldur enn at lata landstýrisfólk, embætisfólk og nevndarlimir í Fíggingargrunninum standa og fáa ákoyringar fyri nakað, sum varð framt í fullari politiskari semju. Teimum tørvar nú uppbakking frá Løgmanni.

Tað hevði hóskað seg einum statsmanni at melda út, at hatta var tað, sum var samtykt, og tikið tað á sínar herðar sum samgonguleiðari. Ein útmelding frá løgmanni beinanvegin hevði eisini verið við til at forðað fyri, at almennur ivi bleiv sáðaður um sølutilgongdina. Einki hevði farið av Løgmanni, um hann gjørdi hetta, tí ein og hvør, sum hyggur at málinum sær, at ein stórur meiriluti av tinglimum fingu júst tað, teir bóðu um. Løgmaður stendur á odda fyri samgonguni, eisini tá samgongan við dyggum stuðuli frá andstøðuni hevur framt nakað, sum aftaná kann tykjast ópopulert.

At samgonga og andstøða so hava lært nakað av hesum málinum, kann væl vera, men tað kann so ikki brúkast í einum máli, sum er avgreitt. Skotið er upp at fáa kannað alt málið. Kann slík kanning geva svar uppá tann iva, sum er sáddur, so eigur hon at verða gjørd.

**Sosialurin**

## Soleiðis er tá løgmaður vaknar

**HØGNI HOYDAL**
Formaður
Tjóðveldisfloksins



Politisk ábyrgd, politisk atgerð og avleiðingar eru í Føroyum sjáldsom fyribrigdi. Og tá tað hendir, vendir oftast skeivan veg.

Løgmaður er í brátt 4 ár sjáldan settur til svars fyri nakað politiskt mál, ið hann av sonnum hevur ábyrgdina av. Atgerð og avleiðingar eru merkiliga rárar hendingar.

Bara seinasta mánaðin kunnu vit taka hesi dømi úr rúgvuni:

- Fiskirættindini skuldu avreiðast endaliga frá tí almenna til privata ogn hjá teimum fáu. Løgmaður lat ikki við seg koma og fanst ístaðin at teimum, ið mótmæltu. Í seinastu sekundi hálsaði hann um, tí fjølmiðlar og serfrøðingar ikki lótu hann sleppa – og hann skírdi nú málið at snúgva seg um løgfrøðisligar smálutir.
- Føroya Banki verður seldur, og ein røð av álvarsligum ivamálum koma fram, ið langt síðani ávarað hevur verið ímóti. Tá ivamálini vórðu reist, meðan enn bar til at gera nakað við tey, leyp løgmaður á tey, ið funnust at og skírdi tey óseriøs. Nú hoyrist ikki orð frá løgmanni, hóast málið snýr seg um pengaupphæddir hjá okkum øllum, ið svara til meira enn helvtina av fíggjarlógini í landinum. Sosialurin sigur, at løgmaður er ikki at fáa fatur á.
- Hópuppsagnir eru á Postverkinum. Tey størstu almennu fakfeløgini hava alment funnist at og vent sær til løgmann sum ovasta fyrisitingarliga leiðara. Tey spyrja m.a., um framferðin er í samsvari við tær avtalur og sáttmálar, ið gjørdar eru í sambandi við at Postverkið gjørdist alment partafelag. Ikki eitt orð frá løgmanni.

Nú seinast ber Dimmalætting tíðindini um, at danska sendistovan á staðnum hevði givið boð um at flagga við Merkinum undir Dannebrog á Rhodos. Ikki eitt orð frá løgmanni, sum annars er staddur á Rhodos. Ongin reaksjón.

**Men so kom vend í**

Undirritaði loyvir sær so at spyrja danska uttanríkisráðharran um tær upplýsingar, ið eru bornar fram í Dimmalætting. Heilt sjálvsagt, eftirsum danska uttanríkistænastan er nevnd sum upphav til hesa hending (og vit hava júst havt eina aðra orrustu, har krøv vóru um at vit skuldu flagga í Íslandi sum "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne").

Og hygga nú: Nú koma tær sterku kenslurnar fram í barmi løgmans. Hann er rasandi og traðkar fram beinleiðis í Degi og Viku. Nú skorta ikki stór orð, hvassar atfinningar og hørð persónlig álop frá løgmanni. Nú skulu atgerðir vera og avleiðingar takast.

Ikki um at geva burtur fólksins ogn ella um rættartrygd.

Ikki um fakfelagsrættindi ella starvsfólkapolitikk.

Ikki um niðurgeringina av føroyska samleikanum, sum er endurgivin í Dimmalætting.

Nei, hann er rasandi inn á undirritaða og Tjóðveldisflokkin. Nústaðni fer hann í telefonina at fáa síni embætisfólk og danska uttanríkisráðið at kanna málið. Nústaðni skulu øll knappliga í arbeiðsklæðini, tí nú ræður jú um at at verja sambandið við danska ríkið. Og soleiðis fer orkan til at skelda okkum – bert tí vit hava fylgt eini hending á mál, ið vit hvørki hava reist ella eru upphav til.

Hetta hevur verið lagi í fýra ár. Kanska stuttligt, at tað altíð er hetta, ið fær løgmann upp úr stólinum. Men als onki stuttligt fyri politisku gondina og ábyrgdina í hesum landi.

## Høgni Hoydal átti at klappað sínum politiska hesti áðrenn hann loypir á bláman

**JOHAN DAHL**
løgtingsmaður



Eftirhondini er paniska fullveldispsykosan hjá Høgna Hoydal við at gera okkum føringum fyri skommum.

Tað er ikki sørt fjølmiðlasirkus hann, við kringvarpi og bløðum á baki gera burtur úr einum mistaki hjá einum grikskum hotelstjóra, sum flaggaði við føroyska flagginum undir tí danska uttan fyri hotel sítt á Rhodos.

Sjálvandi skuldu danir hava skuldina – danska uttanríkistænastan og sendistovan í Grikkalandi skuldu verða komin við hesum kravboðum um flagging.

Við rakettferð varð fyrispurningur um málið sent frá fólkatingsmanninum, sum við góðari samvitsku heintar 4,5 mill. til politiska propaganda móti dønum og donskum koloniharrum - úr danska statskassanum (donsku vaskikonuni á Vesturbrúgv) um árið saman við norðuratlantsbólkafeløgum sínum.

At ein ørkymlaður Høgni brúkar einhvønn politiskan møguleika fyri at skapa órógv millum góða samstarvið millum Føroyar og Danmark er onki nýtt, men hetta seinasta uppáhaldi og skuldsetingarnar, sum hava verið frammi um donsku luttøkuna av mistakinum hjá hotelstjóranum á Rhodos, hoyrir ongastaðni heima.

Tað sær út til, at tað er við at fjara í fullveldispolitikkinum, um eitt so lítið mistak skal blásast upp, sum vit her hava verið vitni til.

Trúði ikki at Høgni Hoydal var so politiskt panikksligin, sum hetta mál vísur hann veruliga er.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.